# Legði Fabregas undir at spýta

Arsenal mundi upplivað marruna í gjárkvøldið, tá tvey sein mál á heimavølli ímóti Hull fingu bjargað liðnum ein 2-1 sigur og pláss í hálvfinaluni í FA Cup-kappingini. Eftir dystin legði Hull-venjarin, Phil Brown, tó dent á nakað heilt annað, tí hann vildi vera við, at skaddi Arsenal-spælarin, Cesc Fabregas, hevði spýtt eftir hjálparvenjaranum hjá Hull í spælaragongdini.

# Nógvur EM-hondbóltur á skránni hesa vikuna

Ikki færri enn 30 dystir millum tilsamans 30 lond verða hesa vikuna spældir í EM-undankappingini í manshondbólti, nú fimta og sætta umfar í teimum sjey bólkunum verða spæld. Talan verður um dystir fimta umfari í dag og í morgin, og í sætta umfari leygardagin og sunnudagin. Meginparturin av dystunum verða sendir í sjónvarpið, so mong fáa høvi til at fylgja við, hvussu gongst liðunum í royndum sínum at sleppa til endaspælið í Eysturríki næsta ár. Bæði útvarpið og sjónvarpið hjá Kringvarpinum senda frá dystinum Føroyar-Sveis.





*Hondbóltslandsliðið hevur havt fýra venjingar síðani fríggjakvøldið, og í kvøld klokkan 19 verður so fyrri dysturin ímóti Sveis í ítróttarhøllini á Hálsi*
*Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir*

# Vilja yvirraska ímóti Sveis

**Bæði spælarar og venjarar halda, at møguleiki er fyri at yvirraska ímóti Sveis í kvøld. – Vit fara eftir einum góðum úrsliti, sigur Heini Hanusarson**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Hóast úrslitini í dystunum hjá føroyska manslandsliðnum í hondbólti higartil í EM-undankappingini ikki hava verið nakað at reypað av, umframt at liðið hevur tapt ein vinardyst ímóti Grønlandi í ár, hevur tað ikki sett stórvegis skøvur í føroyska sjálvsálitið.

– Vit eru altíð tað veikara liðið, tá vit koma inn í hesa kappingina, og vit mugu bara síggja í eyguni, at teir eru nógv betri enn vit. Men tað er einki stuttligt at tapa, og eg haldi ikki, at tað er eitt flott úrslit at tapa við fýra málum. Annaðhvørt vinnur tú, ella tapir tú, sigur Finnur Hansson, sum er líka avgjørdur, tá vit spyrja, hvat hann heldur vera eitt gott úrslit ímóti Sveis í kvøld.

– Ein sigur er eitt gott úrslit, einki minni enn tað. Vit vita jú, at teir hava havt svingandi úrslit, so tað sigur eitt sindur um liðið. Okkurt er, sum ikki fungerar hjá teimum, og vit vóna sjálvandi, at teir koma hendavegin og taka tað eitt sindur »la-la« og so koma vit við 110 prosentum og geva teimum kanska eitt sindur av einum yvirraskilsi.

## Ikki ómøguligt

Heini Hanusarsson sigur seg kenna lítið og einki til Sveis, síðani Føroyar spældu ímóti teimum síðst fyri góðum átta árum síðani.

– Tá taptu vit nokk so fitt, og eg giti bara, at teirra framgongd hevur verið stór. Vit hava jú ikki havt stóra framgongd á landsliðnum, so eg vænti, at tað verður ein stór uppgáva, sigur kollfirðingurin, sum tó ikki sær hetta sum eina ómøguliga uppgávu at loysa, hóast hon er stór.

– Eg vóni, at vit kunnu fáa eitt gott úrslit og kanska yvirraska. Tað fara vit eftir, og vóna sjálvandi, at vit fáa stuðul til tað frá áskoðarunum, nú vit spæla á heimavølli.

Annar av landsliðsvenjarunum, Dia Midjord, hevur vónir um, at sleppast skal undan einum av hesum keðiligu dystunum, har Føroyar ikki megna at spæla upp til mótstøðuliðið.

– Vit skulu jú ferðast allan vegin niður til Sveis longu í morginári, og vit vita, at tað er tað stuttligasta, at skula spæla ein dyst niðri í Sveis, eftir at vit fyrst hava fingið eitt klams heima í Føroyum, sigur hann.

– Tí vóni og síggi eg eisini fram til, at vit klára at geva Sveis ein skarpan gang í heimadystinum.

# Fjórðu ferð ímóti Sveis

**Dysturin í kvøld er fjórða uppgerðin millum Føroyar og Sveis. Hinar tríggjar hevur Sveis vunnið, men tó bara tepurt tvær av ferðunum**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Tá Føroyar og Sveis klokkan 19 í kvøld renna inn á gula og bláa hondbóltsvøllin í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn, er tað fjórðu ferð, at londini hittast í A-landsdysti hjá monnum.

Fyrsti dysturin var spældur fyri yvir 32 árum síðani, tá Portugal hýsti C-HM kappingini. Hetta var í Porto leygarkvøldið tann 27. november í 1976, og tá fingu Føroyar sítt higartil besta úrslit ímóti Sveis, sum vann við einum máli, 21-20, og var á odda 11-9 í hálvleikinum.

Síðani gingu mong ár, áðrenn Føroyar og Sveis aftur møttust á vølli, og tað var í januar mánaði 2001, tá føroyska manslandsliðið eisini var við í einari EM-undankapping. Ta ferðina var avgerð tikin um, at báðir dystirnir skuldu spælast í Føroyum, og teir vóru dag um dag.

Í fyrra dystinum, sum var í Havn fríggjakvøldið tann 12. januar, vann Sveis tepurt við trimum málum, 24-27. Munurin var tann sami í hálvleikinum, tá sveisararnir vóru á odda 14-11.

Dagin eftir, leygardagin 13. januar, hittust liðini so aftur í ítróttarhøllini á Skála, men tá vóru gestirnir nógv betri og vunnu greitt. Tann dysturin endaði 25-18 til Sveis, sum var á odda 15-8 í hálvleikinum.

Nú eru so aftur tveir dystir á skránni ímóti Sveis. Annar verður í ítróttarhøllini á Hálsi í kvøld klokkan 19, og hin verður í sveisiska býnum Appenzell leygarkvøldið klokkan 18, føroyska tíð.

## EM-undankappingin, bólkur 2

### Spældir dystir

| | |
|---|---|
| 29/10 Føroyar-Serbia | 20-41 |
| 01/11 Bosnia-Føroyar | 45-28 |
| 26/11 Russland-Føroyar | 37-16 |
| 30/11 Italia-Føroyar | 30-23 |

### Dystir hesa vikuna

18/03 Føroyar-Sveis
21/03 Sveis-Føroyar

### Støðan í bólkinum

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Serbia | 4 | 3-1-0 | 156-105 | +51 | 7 |
| Russland | 4 | 3-0-1 | 134-106 | +28 | 6 |
| Bosnia | 4 | 2-1-1 | 129-113 | +16 | 5 |
| Sveis | 4 | 1-1-2 | 115-120 | ÷5 | 3 |
| Italia | 4 | 1-1-2 | 102-126 | ÷24 | 3 |
| Føroyar | 4 | 0-0-4 | 87-153 | ÷66 | 0 |

### Írestandi dystir

10/06 Føroyar-Russland
13/06 Føroyar-Italia
17/06 Serbia-Føroar
20/06 Føroyar-Bosnia

# Norðurlendingar stýra dystinum

Tað verða norðurlendingar, sum í kvøld fara at døma og eygleiða, tá Føroyar og Sveis spæla.

Dómararnir eru svenskarar og eita Henrik Mäkinen og Göran Jonsson, og EHF-eygleiðarin til dystin er danskarin Allan Lund.

Serliga hesin síðstnevndi av teimum trimum er væl kendur í Føroyum. Hann vitjaði fyrstu ferð hendavegin í 1980 sum landsliðsvenjari hjá Grønlandi. Eisini hevur hann vant donsku landsliðini hjá bæði kvinnum og monnum, men nú starvast hann í europeiska hondbóltssambandinum, EHF.

**hil**